# BØRN OG UNG MÓTI LÝSINGU

**LÝSINGAR** Framyvir eiga foreldur at geva sítt samtykki til, at børn teirra í skúlum og dagstovnum luttaka í virksemi og undirvísing, ið verður bjóðað av vinnurekandi

Rigmor Dam

Í einari vegleiðing frá Brúkaraumboðnum, sum verður sett í gildi 1. juli 2010, verða ásettar reglur fyri marknaðarføring mótvegis børnum og ungum.

Í hesum reglum verður millum annað ásett, at foreldur eiga at verða kunnað, áðrenn fyritøkur sleppa inn á skúlar og dagstovnar við lýsingartilfarið til børnini.

Hetta málið gjørdist aktuelt fyri nøkrum mánaðum síðani, tá Dimmalætting skrivaði um, at Eik-Banki varð sloppin inn í Hoyvíkar Skúla við kunning um ymsar bankatænastur til ómyndingar.

Tá kom Brúkaraumboðið inn í málið, og í samráð við Mentamálaráðið, sendi stovnurin eina vegleiðing til hoyringar hjá skúlaleiðslunum kring landið.

## Skulu vísa atlit

Í vegleiðingini, sum nú verður sett í gildi, verður týðuliga ásett, at fyritøkur skulu vísa atlit, tá tær marknaðarføra mótvegis børnum og ungum, tí børn og ung eru lætt at ávirka og vanta royndir og evni til at meta um ymisk viðurskifti. Ung og serliga minni børn megna ikki ella hava trupulleikar við at gjøgnumskoða og meta um kunning.

Í vegleiðingini sigur Brúkaraumboðið, at marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung, má ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eggja til harðskap, rúsevnanýtslu, herundir alkoholnýtslu, ella aðra vandamikla ella fyrilitaleysa atferð. Tað framgongur eisini í ásetingini, at marknaðarføring, ið vendir sær til henda bólk, ikki á ósømiligan hátt má brúka harðskap, ótta ella pátrúgv sum ávirkanaramboð.






## Hjálp til fyritøkurnar

Sambært Brúkarastovninum er vegleiðingin fyrst av øllum ætlað sum hjálp til fyritøkur, reklamuvirki, sakførarar og aðrar ráðgevar. Í síðsta enda vera tað tó kortini dómstólarnir, ið staðfesta, um ásetingar í marknaðarføringslógini eru brotnar, og um nakað revsivert er farið fram.

- Tá ein fyritøka hevur børn og ung sum málbólk, má hon taka atlit til henda bólk av ungum brúkarum/kundum, og átaka sær sína etisku ábyrgd. Í lógini er lagt upp til, at fyritøkurnar eru tilvitaðar um hesa ábyrgd, ið við fyrimuni kann handfarast umvegis egnar etiskar reglugerðir, sigur Brúkaraumboðið.

## Lýsingar í barnaverðini

Eitt serligt mál, sum mangan verður tikið fram, tá umrædur lýsingar og marknaðarføring mótvegis børnum og ungum, er spurningurin um, hvørt tað skal verða loyvt fyritøkum at fara inn í skúlar og dagstovnar við tilfari, kunning, gávulutum og undirvísingartilfari.

Tað hevur verið ført fram, at foreldur senda børnini í skúla og á stovn, og ikki út í almenna rúmið, og tí skulu tey verða vard móti lýsingarherferðum har.

Í vegleiðingini frá Brúkaraumboðnum er ein partur um skúlasponsorering og marknaðarføring í skúlum og dagstovnum fyri børn og ung.

Brúkaraumboðið greiðir frá, at skúlasponsorering er ein serligur formur fyri marknaðarføring, har eitt nú fyritøkur og vinnufeløg til dømis bjóða skúlum ókeypis undirvísingartilfar, tað kann vera bøkur og annað skrivligt tilfar ella KT- og

